INPACT INTERNATIONAL

# Starvsfólk

Fyri ein av kundum okkara, søkja vit eftir einum roknskaparkønum fólki at byrja skjótast gjørligt.

Talan er um eitt áhugavert fulltíðararbeiði og fevnir um at fyrisita m.a.:

- umsita og avstemma ognara- og skuldarabókhaldið
- dagliga bókhalds-, roknskapararbeiði og avstemming
- uppseta mánaða- og ársroknskapir og fíggjarætlanir
- annars alt vanligt skrivstovuarbeiði

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og hóskandi teoretiskan kunnleika til skrivstovu-, roknskapar- og telduarbeiði. Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision Finansial er ein fyrimunur.

Fyri ein, ið kundi hugsað sær eitt sjálvstøðugt og fjøltáttað arbeiði við góðum arbeiðsviðurskiftum og góðum persónligum menningarmøguleikum, er hetta tað rætta starvið.

Løn eftir avtalu.

Hevur tú áræði, kann virka sjálvstøðugt og hevur royndir innan bókhalds- og roknskaparyrki, við hóskandi ástøðiligari útbúgving, so er tú tann, vit søkja.

Nærri fæst at vita við at ringja tlf. 314700 og spyrja eftir Eilif Petersen ella Jógvan Amonsson.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum verður at senda **innan 20. mai 2001** til:

**P/F Grannskoðaravirkið INPACT statsaut. revisorar**
R.C.Effersøesgøta 26 · Postrúm 191 · FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 314700 · Telefax +298 313815
E-mail: inpact@post.olivant.fo

# Útbjóðing

Arbeiðið at taka niður ein 600 m² stóran bygning, eystast á havnalagnum í Kollafirði verður við hesum boðið út. Bygningurin er fyri ein stóran part gjørdur úr betongelementum.

Arbeiðið fevnir um:

1. Niðurtøku og burturbeinan av tilfari. Niðurtikna tilfarið er ogn arbeiðstakarans.
2. Upptøka og burturbeinan av fundamentum, gólvum og betongi/asfalti á økinum uttanum.
3. Planering av økinum.

Tilfar fæst við at venda sær til Tórshavnar havn.

Tilboðini skulu vera Tórshavnar havn í hendi í seinasta lagi mánadagin 14.05.2001, kl. 9.00.

**Tórshavnar havn**

FØROYA PEDAGOGFELAG

# Hálvtíðarstarv sum bókhaldari

Søkt verður eftir bókhaldara til skrivstovu felagsins at arbeiða hálva tíð. Møguleiki er fyri, at starvið seinri verður meira enn hálvtíðar starv.

**Bókhaldarin skal taka sær av**

- Dagligu bókingunum
- Limaskrásetingini

**Krøv til umsøkjaran**

- Royndir í bókhaldsarbeiði
- Góðan teldukunnleika
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt

Ynskiligt er, at viðkomandi hevur kunnleika til C5 Concorde skipanina, men er tó ikki ein treyt.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Á skrivstovu felagsins arbeiða ídag tvey fulltíðarsett fólk.
Meira fæst annars at vita um felagið á heimasíðu okkara www.pedagogfelag.fo

Umsóknir skulu vera felagnum í hendi skjótast tilber og í seinasta lagi 25.mai.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til felagið
mánadag - hósdag millum kl.13.30 -16.30

**Føroya Pedagogfelag**
Tungugøta 1
Postsmoga 318
Tórshavn
Tlf. 317576
e.mail: pedagog@pedagogfelag.fo

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Sosialurin - 311820

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

# Reyði Krossur Føroya

**Boks 1015, 110 Tórshavn**
**Tlf. 319630, Fax:311217**
**E.mail: redcross@redcross.fo**

Skeiðtilboð Bráðfeingishjálp í 1.hjálp

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Føðingardagur (skal hava fylt 14 ár): _________

Tlf./Fax: ____________________

T-postur: ____________________

Ynski at luttaka í set x)

O Grundskeið í 1.hjálp, byrjar 07.05.01
kl. 19.00

Kostnaður fyri hvønn við frálærutilfari: kr. 380,-

O Víðka skeið (30 t.) í 1. hjálp, byrjar 18.05.01
kl. 19.00.
Grundskeið íroknað kostnaður við frálærut. kr. 915,-

O Endurútb. í 1. hjálp (3 t.) byrjar 08.05.01
kl. 19.00
Grund-/víðkað skeið ikki eldri enn 3 ár – hav frálærutilfar við frá grundútb.
kostnaður kr. 75,-

ATLANTIC AIRWAYS

# Atlantic Airways

Søkt verður eftir lærlingi til bókhaldið hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur FHS, HH ella líknandi prógv. Annars rokna vit við, at umsøkjarin er ágrýtin og hevur evni at samarbeiða.

Skrivlig umsókn við prógvum og møguligum viðmælum skal í seinasta lagi 10. mai 2001 sendast til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, har eisini nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PriceWaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30 — Sp/f nr. 267
FO-110 Tórshavn — e-mail:
Tlf. (+298) 311017 — rasmussen@rasmussen.fo
Fax (+298) 311018 — Http://www.rasmussen.fo



# Ársroknskapur 2000

## Rakstrarroknskapur

| 1000 kr. | 2000 | 1999 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 19.685 | 17.105 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 7.262 | 6.413 |
| **Netto rentuinntøkur** | **12.423** | **10.692** |
| Vinningur av partabrøvum | 61 | 53 |
| Kostnaður og provisjónsinntøkur | 1.547 | 1.832 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **14.031** | **12.577** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | 652 | -2.683 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 160 | 21 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **14.843** | **9.915** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 9.286 | 7.351 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 961 | 982 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 123 | 694 |
| Tap og burturleggingar | 1.974 | -614 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **2.499** | **1.502** |
| Skattur | 521 | 533 |
| **Ársúrslit** | **1.978** | **969** |
| **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 1.978 | 969 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 29.868 | 28.899 |
| Flutt frá øðrum grunnum | 123 | 66 |
| **Til nýtslu** | **31.969** | **29.934** |
| Flutt til grunnar | 123 | 66 |
| Framflutt úrslit | 31.846 | 29.868 |
| **Tilsamans** | **31.969** | **29.934** |

## Fíggjarstøða 31. desember

| 1000 kr. | 2000 | 1999 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 5.821 | 4.837 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 18.138 | 13.012 |
| Útlán | 217.627 | 205.011 |
| Lánsbrøv | 59.787 | 58.846 |
| Partabrøv | 594 | 551 |
| Ítøkiligar ognir | 4.176 | 3.548 |
| Aðrar ognir | 40 | 40 |
| Tíðaravmarkingar | 110 | 120 |
| **Ognir tilsamans** | **306.293** | **285.965** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til fíggjarstovnar og tjóðbankar | 1.151 | 1.278 |
| Innlán | 269.277 | 250.559 |
| Onnur skuld | 1.158 | 1.461 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 0 |
| Avsetingar til skyldur | 843 | 877 |
| **Eginogn** | | |
| Ábyrgdarapeningur | 818 | 722 |
| Grunnar | 1.200 | 1.200 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 29.868 | 28.899 |
| Flutt frá ársúrsliti | 1.978 | 969 |
| **Eginogn tilsamans** | **33.864** | **31.790** |
| **Skuld tilsamans** | **306.293** | **285.965** |
| Tøl, sum ikki eru við í fíggjarstøðu | | |
| Ábyrgdir o.a. | 2.265 | 2.505 |

SUÐUROYAR SPARIKASSI

www.reproz.com

# Utbjóðing

Fyri Klaksvíkar kommunu verður arbeiðið at gera atkomu- og útstykkingarveg til 1. byggistig á Helnabrekku til 24 grundøkir og partvís liðugtgerð av Helnabrekkuvegnum, boðið út alment.

Arbeiðið umfatar í stórum: jørð-, kloakk-, betong- og asfaltarbeiði.
Atkomu- og útstykkingarvegurin er 380 m.
Partvís liðugtgerð av Helnabrekkuvegnum 330 m.

Útbjóðingartilfarið fæst frá mánadegnum 07. mai við at gjalda kr. 1.500,- í veð á konto 4096023 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi hósdagin 10. mai og venda sær til undirritaða við váttan um, at upphæddin er goldin.

Boðini skulu vera í afturlatnum brævbjálva, merktur

**»Útstykkingarvegur 1. byggistig á Helnabrekku«**

Lisitatiónin verður hildin mikudagin 23. mai kl. 15.00 á teknisku umsiting hjá Klaksvíkar kommunu. Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**Sámal Johannesen**
Ráðgevandi verkfrøðingur
Geilin 22, 700 Klaksvík
Tlf./Fax 456837

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Lýsing

Álagt verður øllum djóra- og flogfenaðeigarum at taka upp alt taðfall, sum kemur frá djórum/fenaði á almennari jørð, t.e. á gøtum, vegum, breytum ella økjum, sum eru opin fyri vanligari ferðslu í Tórshavnar kommunu.

**Tórshavnar kommuna**

*Havnin skal skína*

SNARSKIVAN

# Skúlastýrisvalið 2001

**Vallistin**
Vallistin til skúlastýrisvalið 28. mai 2001 liggur frammi á kommunu-skrivstovuni til 21. mai.
Fólk, sum ikki eru á vallistanum, og sum hava valrætt og valbæri, skulu venda sær til kommunuskrivstovuna í seinasta lagi 21. mai 2001 við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

**Valrættur og valbæri**
Valrætt og valbæri hevur hvør tann, sum hevur foreldramyndugleika yvir teimum børnum, sum eru skrivað inn í skúlan.
Foreldur at børnum, sum komandi skúlaár flyta í annan skúla, hava valrætt og valbæri í tí skúlanum, sum børnini flyta í.
Foreldur at børnum, sum í styttri enn eitt skúlaár eru í øðrum skúla ella stovni, hava ikki valrætt og valbæri í hesum skúla ella stovni.

**Vestmanna Kommuna**

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!